# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Týdningarmesta tilfeingið

Í bókini Visjón 2015, sum nevnist Mál og vegir, verður sagt, at týdningarmesta tilfeingi Føroya í framtíðini er eitt vælútbúgvið fólk. Støðið undir hesum hugsunarhátti er hetta, at góðar útbúgvingar eru grundarlagið undir góðum kappingarføri og undir, at øll skulu kunna taka lut í samfelagnum og á arbeiðsmarknaðinum. Útbúgvingar skulu vera fyri øll og tær skulu sjálvsagt tryggja, at fleiri verða útbúgvin meira alt lívið. Ein vælvirkandi útbúgvingarskipan er høvuðsgrundarlagið undir samfelagsmenningini.

Hetta eru sjónarmið, sum flestallir føroyingar uttan iva kunnu taka undir við. Men hetta krevur, at hitt almenna veruliga setir sær útbúgvingarpolitisk mál og ikki minst sýnir evni og vilja til at útvega fíggjarliga tilfeingi, ið skal tryggja hesi mál. Hetta er galdandi fyri fólkaskúlan, miðnámskúlarnar og fyri hægru útbúgvingarnar. Gera myndugleikarnir ikki hetta, so missa teir trúvirðið og Føroyar gerast eftirbátur í altjóðagerðini og í alheimssamfelagnum.

Í gjárkvøldið vóru hægru útbúgvingarnar í fokus á sera áhugaverdum fundi her i Miðlahúsinum. MFS hevði skipað fyri fundinum, og settu tey ungu serstakliga ljóskastaran á umstøðurnar hjá teimum lesandi á Fróðskaparsetrinum. Ein niðurstøðan á fundinum var, at sosialu og fakligu umstøðurnar hjá studentunum er alt annað enn nøktandi. Hølini eru spjadd og vánalig og tey lesandi hava einki felags savningarstað ella studentahús, har tey kunnu savnast til fakligar og sosialar samverur. Tey lesandi eru ikki sjónlig í samfelagnum eins Setrið sjálvt er alt ov ósjónligt eisini.

Myndugleikarnir mugu nú taka sær um reiggj og koma út við einari ætlan fyri Setrið. Tað kom fram á fundinum, at Setrið eigur stórt grundøki í Markangili. Hví ikki nú taka eina avgerð um, at her skal framtíðar universitet Føroya liggja. Semja var um á fundinum, at universitetið skal verða eitt álitið í framtíðar vitanarsamfelagnum. Skal stovnurin kunna liva upp til hendan leiklut, má hann hava sømilig lívskor.

**Sosialurin**

# Livandi myndir á www.portal.fo




*Niðast á www.portal.fo ber til at síggja, hvørji kykmyndainnsløg eru at síggja. Tað fyrsta, sum dentur verður lagdur á at vísa, verður frá G! Festivalinum í Gøtu*

### Á Portalinum ber nú til at síggja tíðindainnsløg í livandi myndum

KYKMYNDIR
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Skulu tit síggja tað nýggjasta frá G! Festivalinum, so ber til at síggja livandi myndir á Portalinum www.portal.fo

Seinastu mánaðirnar hava livandi myndir verið at sæð á Portalinum, men nú hetta broytt soleiðis, at kykmyndirnar verða lagdar út í flash, so at til ber at síggja tær í øllum teldum.

Tað er P/F Miðlavarpið, sum er dóttir felag hjá Sosialinum, sum ger videoinnsløgini úr Studio Pegasus í Klaksvík, sum Sosialurin keypti fyrr í ár.

- Tað fyrsta vit fara at gera, verður frá G! Festivalinum, sigur Jonhard Hammer, stjóri í Miðlavarpinum. Har verður fylgt við tí sum hendir á festivalnum, og so ber til at síggja livandi myndir, eins og myndir og frásagnir verða at lesa á www.portal.fo og á www.planet.fo

Jonhard Hammer sigur víðari, at lýsingar verða at síggja í endunum á kykmyndainnsløgunum – og fáa lýsarar her ein nýggjan møguleika at lýsa við livandi myndum.

- Vit fara at leggja dent á at vísa frá ítróttartiltøkum, eitt nú fótbólti og kapproðri, men vit fara eisini at gera onnur tíðindainnsløg, men tá verður tað við onkrum øðrvísi vinkli og frá onkrum serligum tiltøkum. Tað verða ikki vanlig sjónvarpstíðindainnsløg, sum verða at síggja á portalinum í fyrstu syftu, sigur Jonhard Hammer.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13³⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.